## DAGSINS MEINING

# Hvat er blivið betur?

Almenna tænastustøðið er støðugt fallandi. Seinasta skommin er, at fólkaskúlin er vorðin forsømdur í so stóran mun, at næmingar ikki fáa so mikið sum ordiligt innivist, sum eitt nú á Argjum. At fáa post leygardag er ikki møguligt í Føroyum í 2002 – aftur eitt dømi, har tænastustøðið er fallið. Skúlanæmingar, ið ætla sær til Havnar við bussi, sleppa ikki, tí man ikki fær mobiliserað eykabussar - aftur eitt dømi um lægri tænastustøði. Barnaansing er ein stórtrupulleiki, ið sær út til at verða komin fyri at verða. Almanna- og heilsuøkið er afturúrsilgt, við væntandi røktarheimsplássum og umstøðum annars. Vit eru vitni til, at man innførir brúkaragjald til tunnlar – aftur lægri alment tænastustøði. Miðnámsskúlar sum eitt nú Fiskivinnuskúlin fáa ikki sømuligar umstøður, av orsøkum, ið fyri uttanfyristandandi líkjast avgerðar-fobi.

Kreppan fyrst í nítiárunum fær mangan skyldina fyri omanfyristandandi trupulleikar. Tað er ivaleyst rætt, at nógv kann sporast aftur til kreppuna, men nú fer at tátta í 10 ár síðan kreppan var uppá tað harðasta, og tey seinastu 6 árini hava vit sæð risaøkingar í almennu útreiðslunum. Hvar hesar økingar eru farnar vita vit ikki, men vit kunnu staðfesta útfrá omanfyristandandi uppremsan, at nógv av teimum økjunum, ið eru næst borgarnum, har borgarin fær eina beinleiðis tænastu, eru forsømd. Hetta merkir, at raðfestingin ikki er nóg góð.

Hvat er blivið betri seinastu árini? Vit hoyra javnan um styrkta umsiting – av hvørjum?

Ungdómurin í dag heldur, at bíðilistar í heilsuverkinum altíð hava verið. So er ikki.

Tað kann ikki vera rætt, at vit fáa meira fólk at umsita minni. Lægri tænastustøði til borgaran eigur at merkja lægri skatt. Nú sær ikki út sum tað er loysnin, eftirsum standurin er so vánaligur, sum hann er. Kanska desentralisering av játtanum hevði hjálpt, soleiðis at økini næst borgaranum fingu fyrst, og síðan neyðuga miðfyrisitingin av hesum basalu økjum, og so sá man hvussu nógv var eftir til onnur øki og formulering av tingum í miðfyrisitingini, sum eru góð at hava, men ikki strengt tikið neyðug. Um man ikki visti betur, so kundi tað sæð út sum, at raðfestingin var at uppfinna nýggjar herligheitir og orðingar av politikkum á ymiskum økjum, samstundis sum fundamentið undir vælferðarsamfelagnum er við at syndrast av ov lágari raðfesting. Tað nyttar ikki at smíða pyntilistar á ein bygning, ið er um at fara um koll, tí at grundin er forsømd.

At hugsa sær, at føroyski fólkaskúlin noyðist at seta næmingar á eitt neystaloft í 2002. Hvar er politiska raðfestingin? Vónandi fáa vit eitt orðaskfti um almenna raðfesting, ongantíð ov skjótt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Trivnaður

**Randi í Jógvanstovu**
*Leirvík 1. september 2002*



Tað, at fast samband nú verður millum Norðoyggjar og høvuðsstaðin Tórshavn, fer at hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið. Tann størsti og tann næststørsti býurin í landinum fara at verða tengdir saman við føstum sambandi, sum ikki letur seg fora av veðri og vindi ella tekniskum trupulleikum. Vit fara ikki longur at kenna á okkum, at vit búgva í einum oyggjasamfelag. Norðoyggjar verða tá meir ella minni eitt við "meginlandið". Hetta fer at hava fylgjur við sær, góðar eins væl og minni góðar.

Latið okkum hyggja at, hvørja ávirkan tað hevur havt aðrastaðni kring okkum, tá iðavgjørt hevur verið at binda fast millum oyggjar og tey sokallaðu "Meginøkini".

Ferðslan um Stórabelt fór úr 8.500 bilum upp í 18.900 bilar, tó at tað var bíligari at ferðast við toki. Tað kostar tað sama at fara við bili um brúnna, sum tað kostaði við ferjuni, og at fara við toki er nógv bíligari. Harav sæst, at hann, ið hevur tørv á at ferðast og helst dagliga, fegin vil gjalda tað, sum tað nú einaferð kostar. At ein kann ferðast, uttan at veður og vindur ella tekniskir trupulleikar o. a. t. fora einum, hevur so stóran týdning, at prísurin als ikki liggur fremst í huganum.

Norðingar noyðast ikki longur at at flyta sítt góðs til og frá við skipum. Nú kann flytast við lastbilum á nátt eins væl og í dagtímunum, og tá ið talan er um fiskavørur verða sjálvandi stórir kølivognar brúktir.

Vit, sum í dag búgva á hesum ótrúliga vakra stað, eru hvønn einasta dag umgird av einum vakurleika, sum einans gevur okkum orsøk at spyrja: Hvat eru vit, at vit hava alt hetta uppiborið? Her er so nógv og so gott, at vit einans kunnu ynskja at deila tað við onnur, og ta vilja vit fegin.

Tað er sjálvsagt í okkara hugaheimi, at fólk ynska at vera her.

Hetta er bygdin, har tú sært sólina fara í havið á sumri, har tú kanst vera "tilflytari" uttan at vera fremmandur, og har tú kanst vera partur av bygdamyndini, ella har tú kanst vera í frið, um tú ynskir tað.

Og vit vilja gjarna lata dyr okkara upp fyri øðrum. Eisini Norðingum, sum kanska høvdu hug at seta seg niður her. Sum er, hava vit nógv og gott byggilendi, men verður vegurin lagdur ígjøgnum hetta lendið, fer nógv burturav, og tað, sum eftir verður, man verða lítið at ynskja sær.

Hvat gott byggilendi er?

Tað er byggilendi, har trivnaðurin er settur í hásætið, har familjur trívast, tí tey fáa tryggar umstøður. Har børnini ikki eru í lívsvanda av ferðsluni, tá ið tey fara í skúla ella til eitthvørt annað og koma heimaftur. Og grøn øki, spælipláss og o. a. t. hoyra sjálvandi eisini til.

Trivnaður eigur ikki einans at verða eitt "mótafyribrigdi", eitt orð, ið vit sleingja út, tá ið tað passar inn í "krammið" hjá okkum. Vit eiga at hava tað VIÐ okkum í øllum viðurskiftum.

Tað byggilendið, ið her verður hugsað um, er tað lendi í Leirvík, sum "tað almenna" í løtuni ætlar at leggja ein veg ígjøgnum. Ein veg, sum frá miðlinjuni og út fer við einum øki, ið er 25 m breitt, ein veg, har koyrt verur 80 km um tíman sambært landsverkfrøðinginum uttan nakað "bums". Eg fái illa sett trivnað í samband við hetta!

Varisligar framrokningar siga, at í 2005 fara meir enn 500 bilar ígjøgnum tunnilin um samdøgrið.

Eg veit væl, at aðrastaðni verður góðtikið, at gangurin er nógv meir, enn hann vit uppliva her.

Eg eri uppvaksin í einum umhvørvi, har flogfør við jøvnum millumbili flugu omanfyri húsini hjá okkum, 2 – 2 1/2 minuttir ímillum, so eg veit, hvat ið eg tosi um, og havi av tí sama lært at virða tann friðin, eg upplivi her.

Trivnaðurin skal ikki einans verða eitt orð, men eitt mál, eitt mál vit arbeiða fram ímóti. Trivnaðin innandura eiga vit sjálvi at skapa, men trivnaðin í samfelagnum eiga tit sum landsmyndugleikar at skapa, og lata vit tað upp í hendur tykkara í vónini um, at trivnaðuri framvegis er í hásætinum.

Gerið tað við skili - vit verða nógv, sum fara at kenna fylgjurnar av avgerð tykkara!

Sosialurin i Sosialurin

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Tjóveldisflokkurin og fólkaatkvøðan um NATO

**– og um útbyggingina á Eiði og virðingin hjá Anders Fogh Rasmussen fyri Føroya Fólkið**

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



**Tjóðveldisflokkurin og NATO:** Øll sum hava fylgt við síðan NATO kom til Føroyar - í Mjørkadal, vita, hvussu hesir hava geberdað sær frá fyrsta degi. Tað vóru javnan og savnan skrúðgongur/mótmælisgongur niðan í Mjørkadal fyri at mótmæla skrímslinum NATO og fáa teir at pakka sekkin og sleppa sær har pipari grør.

Sum tíðirnar broyttust og múrurin og jarntjøldini fullu til tey lond, sum tann mest ultra vinstrahalli parturin av hesum flokki hálovaði, so bleiv eisini eitt sindur tamari – longri bleiv millum skrú-gongurnar, og til seinast doyðu tær burtur.

Teir fingu ivaleyst endiliga eyguni upp fyri, hvussu neyðugur Nato-felagskapurin var fyri friðin kring heimin.

**Fólkaatkvøðan hjá Høgna Hoydal:** Tað undar meg stórliga, at fólkaatkvøða nú skal verða so altumráðandi fyri formannin í Tjóðveldisflokkinum og at eitt mál, sum NATO útbyggingin á Eiði skal leggjast út til folkið til fólkaatkvøðu - haldi eg má verða skemt frá formansins síðu?

Eru vit ikki fyri mánaðum síðani valdir á Føroya Løgting júst fyri at taka støðu og gera tað, sum vit meta verða rættast fyri okkara veljarar?

Hevur Høgni longu gloymt teirri fólkatkvøðuna, sum var lovað Føroya fólki, men tá tað vísti seg, at útfallið ivaleyst ikki fór at blíva tað, sum Høgni, Anfinn og Helena vildu hava tað at verða - ja so bleiv hetta avlýst.

Fólkastýrið og demokratiið gjørt til gjøldurs rætt og slætt!!!!!

**Anders Fogh Rasmussen og virðingin fyri fólkastýrinum:** Nú sigur sami Høgni í bløðunum, at danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, ikki virðir føroyska fólkaræðið, tí hann ikki vildi svara upp á ein hypotetiskan spurning frá útvarpskvinnu!!!?????

Álvaratos Høgni – er tíðin ikki komin at arbeiða fyri framhaldandi góðum viðurskiftum millum ríkispartarnar, ístaðin fyri alla tíðina at royna at sáa iva og royna at skapa ófrið.

Anders Fogh Rasmussen virðir uttan iva Føroya Fólk eins høgt og danska fólkið – eg ivist onga løtu í, at hann virðir demorkatiið og tær avgerðirnar, sum fólkið her á landi taka til einahvørja tíð.

Eg vóni, at tú ger tað sama, Høgni, virðir fólkastýrið, tá tíðin kemur og tú møguliga skal góðtaka eitt nei til fullveldisætlan tína !!!! Hypotetiskt sigur onkur?? Kanska!!

–Time will tell.

# Hvat er at vera etableraður?

**(viðmerkingin til oddagrein í Dimmalætting leygardagin 31.august)**

**Ivan Eginsson**



Í Føroyum skulu føroyingar ráða. Tað er undarligt í mínari verð at síggja hesi orð, sum byrjan til eina grein, ið uttan iva er skrivað av einum sannførdum sambandsfólki. Trúði, tað vóru fyrst og fremst flokkarnir í núverandi samgonguni, ið stuðlaðu tílíkari áskoðan.

Ein partur av greinini snúði seg um mín persón. Tí haldi eg meg vera noyddan til at kasta ljós á nøkur viðurskifti, ið hava við mín persón at gera.

Ja eg eri føddur og uppvaksin í einum øðrum landi. Hetta er veruleikin, ið eingin kann gera nakað við. Tað eru fleiri, ið undrast yvir, at eg skuldi fella so skjótt og so lætt inn í tað føroyska samfelagið - málsliga, mentunarliga og hugsjónarliga. Fragreiningin er annars sera einføld - eg kenni meg sum ein føroying (og ikki fremmandur), síggi øll ting - bæði her heima og úti - við føroyskum (og ikki fremmandum) eygum, royni at tæna tí føroyska samfelagnum við góðari samvitsku. Og tað ætli eg mær eisini at gera framyvir.

Ja eg havi eina meining um politisk og onnur viðurskifti og vil stuðla - eisini í gerð - einum føroyskum politiskum ungdómsfelagsskapi, ið er stovnaður og virkin á einum demokratiskum grundalagi, eins og allir aðrir felagsskapir, sum eru alment skrásettir í Føroyum í dag. Tað var ikki neyðugt hjá hesum felagsskapinum at fara út um landoddarnar (sum stendur skrivað í Dimmalætting) fyri at fáa fatur í meg. Eg búgvi jú her í Føroyum, og havi gjørt tað eitt drúgt tíðarskeið eisini. Í nøkur ár havi eg verið limur í viðkomandi felagsskapinum.

At hava áhuga fyri øllum samfelagsviðurskiftum, eisini politiki, og at vera virkin í teimum - hvat, um ikki júst hetta, er tekin um at vera etableraður, fullfíggjaður limur í einum samfelagi?

Hví kann eg ikki hava t.d. politiskar ætlanir, tá ið eg vil gagna teirri føroysku tjóðini væl og virðiliga, og haldi meg hava evni til at vera gagnligur á einum ella øðrum øki? Hví skal Dimmalætting sýta mær, einum, ið hevur føst starv og bústað í Føroyum, at vera føroyingur, um eg vil vera tað? Er tað ikki brot av júst teimum grundleggjandi mannarættindunum, ið tit sipa til í skriving tykkara?

Eri annars púra sannførdur sjálvur, at russar, danir, norðmenn, amerikanarar, kinesarar, arabarar ikki skulu taka nakrar avgerðir fyri føroyingar. Tí at í Føroyum skulu føroyingar ráða. Og um leiðslan í Dimmalætting fær ilt við at góðtaka meg sum ein føroying, so er tað hennara, og als ikki mín trupulleiki. Tað eru nógv onnur í hesum landinum, sum gera tað.

P.S. Eingin "rættur" føroyingur hevur rættlisið hetta.

# Bíliga arbeiðsmegin kring landið?

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*



Eg kann slett ikki góðtaka at vit hava bíliga arbeiðsmegi, óhefta av fakfeløgum ið leggja fót fyri arbeiðsleysu/tøku undir ALS og Almannastovuskipanum kring landið.

Eg havi ómetaliga nógv ímóti bíligari arbeiðsmegi, tá ið hesi sleppa sínum foreldrum undan forsyrgjaraskyldum, til tey eru 18 ára gomul, úti í privatu familjufyritøkum.

Eg komi framhaldandi at geva øllum fakfeløgum grovfíluna, taka hesi ikki annað skinn um bak, so vit koma tí bíligu arbeiðsmegini til lívs kring landið, ongantíð ov skjótt. Eg haldi tað vera nógv fyri, at hesi skulu taka livibreyði frá teimum arbeiðsleysu/tøku undir nevndu skipanum, ið kundi arbeitt ístaðin fyri hesa bíligu arbeiðsmegi ídag.

Eg vil finnast harðliga at øllum fólka- og miðnámsskúlanæmingum og lesandi føroyingum og lærlingum, ið arbeiða við síðuna av skúlum og lærustovnum og plássum.

Tað er eingin av hesum ið røkir samfelagsskyldu, ið eru ørindasveinar, arbeiðsgevarum og skitna arbeiðsamboði, mótvegis fakfeløgum at undirgrava lønarlagið.

Tað er ikki minst galdandi tá ið hesi taka upp verkfalsrakt arbeiði, tá fakfeløgini hava sáttmálasamráðingar við arbeiðsgevarafelagið og við fíggjarmálaráðið.

Eg vil koma at finnast harðliga at arbeiðsgevarar ikki eru skipaðir sum limir í arbeiðsgevarafelagi, og tá ið teir fáa arbeiðsmegi, uttan um áðurnevndu skipanir.

Tað skulu allir arbeiðandi føroyingar vera limir, í einum av fakfeløgum, hvørs fakliga arbeiði/starv/fellur inn undir, tá ein vil koma fakfelagsólevnaði til lívs.

Tað skula tit gera tykkum greitt á fakfelags skrivstovum og úti í skúlunum og lærustovnum og plássum og úti í privatu familjufyritøkum kring landið í dag.

Tað er ikki minst galdandi útisetarar uttanlands, ið komin eru heim at arbeiða í summarfrítíð kring landið.